Høgni Hoydal
Sirið Stenberg
Hervør Pálsdóttir
Eirikur í Jákupsstovu
Liljan Weihe
Bjørg B. Egholm
vegna Tjóðveldi

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Ræðislógin)
(At taka løgreglu, ákæruvald og brotsmálaumsorgan undir føroyskt ræði)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum (Ræðislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 16. mai 2024 verða § 1, stk. 2, nr. 1 og 11 strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2028.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Tað hevur alstóran týdning fyri at menna Føroyar sum tjóð og veruligt fólkaræði, at vit sjálv taka ábyrgdina av rættarskipan, løgreglu, ákæruvaldi og brotsmálaumsorgan.

Vanliga verður hildið uppá, at ein fólkaræðislig skipan má í minsta lagi skipast í trimum við lóggevandi, útinnandi og dømandi valdi. Í Føroyum hava vit ikki fult ræði á lóggevandi valdinum og útinnandi valdinum, og hava als onki ræði á dømandi valdinum – tíansheldur á ákæruvaldi, løgreglu og brotsmálaumsorgan, ið skulu handhevja lógirnar í samfelagnum, reisa ákærur og revsa í brotsmálum.

Avleiðingarnar eru eyðsýndar: Tað, sum hendir í rættarskipanini, løgregluni, ákæruvaldinum og brotsmálaumsorgan í okkara egna landi, fer fram uttan nakra fólkaræðisliga viðgerð ella politiska ábyrgd í Føroyum. Tær mest víðfevndu heimildirnar hjá myndugleikum mótvegis einstaka borgaranum og samfelagsbólkum eru ikki undir okkara egnu ábyrgd og egna eftirliti. Atfinningarsom viðurskifti, drál, fyrnað mál, heimild at brúka vald og vápn, vantandi játtanir, tilfeingi og útgerð, verða stundum reist í almenna orðaskiftinum í Føroyum, men ongin verður veruliga settur til svars.

Viðurskifti, ið vit als ikki høvdu góðtikið og tolt, um talan var um ein føroyskan myndugleika, fara aftur við borðinum, og vit standa sum áskoðarar til avgerðir tiknar av myndugleikum í einum øðrum landi.

Onnur avleiðing er, at politiska skipanin í Føroyum sleppur undan at viðgera revsireglur, rættartrygdarspurningar, heimildir til frælsistøku og avlurting av borgarum, støðuna hjá dømdum persónum í fongulsverkinum o.s.fr. Og tá ið Løgtingið smíðar lógir, eru týðandi spurningarnir um revsingarheimildir og tørv á at hava eftirlit við og handhevja lóggávuna, sjáldan partur av viðgerðini og raðfestingunum.

Sostatt hava vit ikki veruligt fólkaræði í Føroyum.

Við hesum uppskoti verður skotið upp at taka løgreglu, ákæruvald og brotsmálaumsorgan (kriminalforsorg) undir føroyskt fólkaræði. Viðvíkjandi rættarskipan og dómstólum hevur í fleiri umførum verið roynt at fáa dømandi valdið undir føroyska ábyrgd. Í sambandi við grundlógararbeiðið í byrjanini av øldini varð ein føroyska rættarskipanarnevnd sett, men lítið er hent seinastu árini. Í øðrum uppskoti á Løgtingi fer Tjóðveldi at skjóta upp at taka hetta arbeiðið uppaftur.

Føroyar gjørdar til danskan "politikreds"
Í dag hava føroyingar onki ræði á virkseminum hjá løgregluni og ákæruvaldinum. Øll embæti og allar avgerðir eru undir donskum ráðharrum og leiðarum. Hóast hópin av vælútbúnum og dugnaligum fólki í Føroyum, verða enn fúti og leiðarar "útsendir" úr Danmark at stjórna løgreglu og ákæruvaldi.

Í stórverkinum *"Politi í Føroyum fyrr og nú"*, hjá Hjartvardi E. Skálagarð frá 2000 og í framhaldinum *"Politiið í Føroyum í 21. øld"* hjá Kára Thorsteinssyni, sum kom út í mars 2026, verður søgan hjá løgregluni í Føroyum dugnaliga greinað og lýst.

Søguliga var løgreglan skipað undir kommununum og við sýslumonnum úti í økjunum.

Seinnu helvt av 1950'unum gjørdi landsstýrið millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin av at flyta málsøkið løgregla til Danmarkar. Framvegis vóru tó sýslumenninir lokalir leiðarar fyri løgregluna úti um landið. Teir høvdu bæði løgregluuppgávurnar og aðrar uppgávur sambært gamlari føroyskari lóg og siðvenju – til dømis við grindaskifti, grannastevnum, landbúnaðar- og friðingarmálum, at gifta fólk borgarliga o.s.fr.

Men seinastu 20 árini er ein øgilig miðsavning av valdinum farin fram – serliga síðani sonevndi "politireformurin" varð trýstur ígjøgnum í 2005.

Og í 2020 vóru bæði broytingar í rættargangslógini fyri Føroyar, ein donsk politilóg fyri Føroyar og ein donsk lóg um donsku fregnartænastuna PET kroystar ígjøgnum í Føroyum, uttan nakra veruliga viðgerð. Hesar lógir hava lagt uppaftur víðfevndari vald til danskar myndugleikar út um føroyskt fólkaræði og føroyskar myndugleikar.

Við politireforminum og nýggju lógunum nú, eru Føroyar gjørdar til ein danskan "politikreds", stýrdur úr Keypmannahavn – eins og Sønderjylland ella Bornholm. Leikluturin hjá sýslumonnunum er støðugt ruddaður burtur í løgregluarbeiðinum, og føroysk løgreglufólk hava mist alla veruliga ávirkan á leiðsluuppgávur.

Fleiri bygdir og øki hava langt síðani mist nærtænasturnar hjá løgregluni, sum vit kendu frammanundan – og gongdin heldur bara fram. Nærum allar avgerðir og samskifti hjá løgregluni í Føroyum fer nú fram umvegis Keypmannahavn.

Fyrireikingarnar eru langt síðani gjørdar til at taka egna ábyrgd
Henda gongdin kundi verið heilt øðrvísi. Í 2003 vóru føroysk og donsk embætisfólk liðug at samráðast um, hvussu bæði løgregla, ákæruvald, brotsmálaumsorgan og dómstólar koma undir føroyskt ræði, og hvussu tey kunnu skipast. Henda frágreiðing og niðurstøðurnar, sum semja var um millum danskar og føroyskar myndugleikar, lýsa alt út í smálutir.

Talan er um eitt stórt tak. Men føroyingar eru væl førir fyri við serfrøði at reka og skipa føroyska løgreglu, ákæruvald og brotsmálaumsorgan og at samstarva við myndugleikar og stovnar í øðrum londum og við altjóða stovnar um tey mál og tær reglur, ið tryggja eina dygga føroyska løgreglu, ákæruvald og brotsmálaumsorgan.

Neyðugar tænastur, ið krevjast í torførum kanningararbeiði hjá løgreglu og ákæruvaldi, kunnu keypast uttanlands og samstørv kunnu skipast, soleiðis sum frágreiðingin leggur upp til.

Í frágreiðingini frá 2003 er kostnaðurin av at taka málini á føroyskar hendur mettur út í smálutir.

Við nýggjastu tølunum frá Ríkisumboðnum er samlaði árligi rakstrar- og íløgukostnaðurin av løgreglu, ákæruvaldi og brotsmálaumsorgan (harundir fongsulsverki) 140,6 mió. kr. í 2024.

Men fyri at leggja upp fyri bæði prís- og lønarvøkstri, neyðugum betringum og betri tænastu, verður skotið upp at meta samlaðu rakstrar- og íløguútreiðslurnar til 155 mió. kr. árliga frá 2028, tá ið skotið verður upp at fremja heimtøkuna.

Landsstýrið kann í samráðingum við donsku stjórnina gera av at fremja heimtøkuna yvir eitt tíðarskeið, har til dømis brotsmálaumsorganin verður tikin fyrst og síðani løgregla og ákæruvald. Verður hetta gjørt, kann figgingin útvegast yvir til dømis tvær ella tríggjar figgjarlógir.

1.2. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er formliga at taka málsøkini løgregla, ákæruvald og brotsmálaumsorgan undir føroyskt ræði.

Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar, sambært lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka, lóggávuvaldið og útinnandi valdið á málsøkjunum løgregla, ákæruvald og brotsmálaumsorgan.

Tær lógir, ið eru galdandi á økinum, halda fram, men føroyskir myndugleikar kunnu gera tær broytingar, ið krevjast, við løgtingslóg.

Dagfestingin fyri at fáa málini formliga undir føroyskt ræði er sett til 1. januar 2028, soleiðis at landsstýrið fær rímiligt skotbrá at skipa viðurskiftini.

Fyrimunirnir eru eyðsýndir:

- Ein føroysk løgregla, føroyskt ákæruvald og føroysk brotsmálaumsorgan kann skipast, ið ikki leggur seg undir ta ógvisligu sentralisering, sum er farin fram og fer fram í donsku løgregluni og sum rakar Føroyar í løtuni.

- Føroyska løgreglan kann skipast við at leggja dent á opinleika og nærleikan hjá løgreglu úti í økjunum – og Tjóðveldi mælir til, at støðir og lokalir leiðarar verða skipað aftur í sýslunum kring landið – í Vágunum, Sandoynni, Eysturoynni og í Norðstreymi.

- Viðvíkjandi brotsmálaumsorgan er eisini tørvur á at skipa eina føroyska rættartrygga skipan og eitt veruligt føroyskt fongsulsverk, har føroyskir fangar ikki verða sendir av landinum. Hetta kann gerast ein stórur fyrimunir fyri rættartrygdina og endur-sosialiseringina av fangum.

- Fólkaræðisliga viðgerðin og eftirlitið við løgreglu, ákæruvaldi og brotsmálaumsorgan verður munandi betri.

- Skjótari og einfaldari verður at fremja betringar í skipanunum og at viðgera átøk og broytingar, ið hava týdning fyri føroyska samfelagið og borgararnar.

Í aðrar mátar stendur verandi lóggáva á økinum við, sbr. § 5 í yvirtøkulógini (Løgtingslóg nr. 79 frá 12. mai 2005) og sbr. § 13 í heimastýrislógini (Lov nr. 11 frá 31. mars 1948).

Í sambandi við yvirtøkuna verða starvsfólkaviðurskifti viðgjørd sambært lov nr. 528 frá 24. juni 2005 om visse personalemæssige spørgsmål i forbindelse med de færøske myndigheders overtagelse af sager og sagsområder, og sambært løgtingslóg nr. 84 frá 14. mai 2005 um rættindi løntakaranna í sambandi við, at landsstýrið yvirtekur mál og málsøki frá ríkismyndugleikunum.

Hetta merkir, at øll vunnin rættindi hjá starvsfólki skulu tryggjast.

1.3. Um týdningin og skipanina sum heild

Eitt avgerandi mál fyri einar frælsar Føroyar er at skipa egna rættarskipan, løgreglu, ákæruvald og aðrar tilhoyrandi stovnar, sum kunnu skapa álit á og betra um rættartrygdina.

Samráðingarnar millum donsk og føroysk embætisfólk um hetta vóru lidnar við ársenda 2003.

Høvuðstættirnir og aðalmálini í tilmælunum og frágreiðingunum eru hesi:

- Løgregla, ákæruvald, rættarskipan, kriminalforsorg v.m. verða skipað undir føroyskum Løgmálaráði.
- Óheft dómaratilnevningarráð verður sett á stovn.
- Óheftur myndugleiki játtar fría rættarprosess.
- Kærumyndugleiki fyri løgreglu verður skipaður.
- Føroyska rættarskipanin verður skipað í tveimum stigum: Føroya Rættur og Landsrætturin.
- Dómararútbúgving, eftirútbúgving og útbúgvingarleið fyri dómarafulltrúar verður skipað í samstarvi við Fróðskaparsetrið, lærustovnar uttanlands og við skipaðari starvsvenjing í Danmark og øðrum Norðurlondum/grannalondum.
- Tænastur og serfrøði verða keyptar til føroysku rættarskipanina og løgregluna í eini skiftistíð og frameftir í størri kanningar- og brotsmálum.
- Føroyar binda seg til altjóða sáttmálar um rættarsamstarv og revsimál og til altjóða sáttmálar um løgreglusamstarv.
- Fongsulsverk verður skipað í Føroyum.
- Føroyskur landssakførari verður settur á stovn.
- Rættargangslógin fyri Føroyar verður dagførd.

Við hesum uppskoti verður løgregla, ákæruvald og brotsmálaumsorgan tikið heim undir føroyska ábyrgd frá 1. januar 2028. Seinni verður uppskot um føroyska rættarskipanarnevnd lagt fram aftur.

Frágreiðingin viðger gjølla spurningar um gegnisreglur og rættartrygd, ið kunnu skapa álit á føroyska løgreglu og rættarskipan og stovnar undir henni. Hetta er týðandi mál í einum komandi føroyskum fólkaræði.

Eitt av aðalmálunum hjá Tjóðveldinum er at bøta um rættartrygdina og tryggja avleiðingar og opinleika hjá øllum myndugleikum í Føroyum.

Eftir okkara tykki er ein høvuðslykil til støðugt at skapa álit á eina føroyska løgverju og rættarskipan, at vit hava ábyrgdina sjálv, hava greiðan opinleika – og kritiska viðgerð og kjak um rættartrygd og skipanir í Føroyum. Og at allir myndugleikar standa til svars fyri føroyska Løgtinginum og fólkinum. Hartil er týðandi, at vit fylgja fremstu altjóða krøvum og lata altjóða stovnar støðugt eftirmeta og gera niðurstøður um rættartrygdina og rættardygdina í Føroyum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Frágreiðingin um at fáa málini á føroyskar hendur er frá 2003, og tískil eru kostnaðarmetingarnar nógv broyttar.

Sambært seinastu tølunum frá Ríkisumboðnum eru samlaðu útreiðslurnar til løgreglu, ákæruvald og brotsmálaumsorgan (harundir fongsulsverk) 140,6 mió. kr. í 2024.

Men ein føroysk løgregla, ákæruvald og brotsmálaumsorgan eigur at skipast við fleiri lokalum leiðarum, bøttum umstøðum og tænastu.

Hartil skal eisini skipast fyrisiting í landsstýrinum. Og leggjast skal upp fyri prís- og lønarvøkstri.

Tískil verður mett, at árligi rakstrarkostnaðurin fyri landið eigur at verða settur til 155 mió. í 2028, tá ið skotið er upp at fremja heimtøkuna.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Fyri landsfyrisitingina verða nýggjar og týdningarmiklar uppgávur at røkja. Fyrisitingin hevði verið best skipað í einum føroyskum løgmálaráði ella innlendismálaráði.

Sambært frágreiðingini frá 2003 skulu skipast tvey til trý størv í landsfyrisitingini til at fyrisita málsøkið. Hesin kostnaður er innroknaður í metingini av samlaða kostnaðinum á 155 mió. kr.

Fyri kommunurnar og fólkið kann tað hava stóran týdning, at vit aftur skipa løgreglustøðir, har tær í dag eru niðurlagdar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur týdning fyri lokalu nærveruna, um fleiri løgreglustøðir verða skipaðar aftur.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið kann hava sosialar avleiðingar fyri fólk og samfelagsbólkar við betri tænastu hjá løgreglu og ákæruvaldi og betri brotsmálaumsorgan og fongsulsumstøðum í Føroyum.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar, men Føroyar fara at gera samstarvsavtalur við onnur lond.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í ósamsvari við nakrar tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?
Ja, við yvirtøkuni fær landsstýrismaðurin heimildirnar, sum higartil hava ligið hjá donskum ráðharra.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn omanfyri nevndu.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Ja	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Við hesi grein verður yvirtøkan formliga framd.

Til § 2
Yvirtøkudagurin er settur til at verða 1. januar 2028 fyri at rúm tíð skal vera til føroyskar myndugleikar at fyrireika seg fyrisitingarliga til øll praktisk viðurskifti.

Fylgiskjal:
Frágreiðing frá føroyskum og donskum embætisfólki frá 2003.

Á Løgtingi, 24. september 2026

Høgni Hoydal	Sirið Stenberg	Hervør Pálsdóttir
Bjørg Brynhildardóttir Egholm	Liljan Weihe	Eirikur í Jákupsstovu